# Ongatíð tonkt uppá veðrið




*– Gretha hevur staðið sína roynd øll hesi 32 árini, sigur Sofus Davidsen úr Æðuvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**RUNAVÍK** Útróðrarbáturin Gretha hevur havt sítt fasta pláss í bátahylinum í Runavík í mong ár. Men gongst sum eigarmaðurin, Sofus Davidsen í Æðuvík vónar og ætlar, skal báturin skifta eigara nakað skjótt. – Hetta er ein sjógóður bátur, vísir hann á.

Snorri Brend

At Gretha veruliga er tað, prógvaði hon longu undir sína fyrsta túri.

Sofus Davidsen hevði bílagt sær henda Viksund-bátin úr Noregi, og nú varð hann klárur at fara í drift.

Teir tók ta avgerð at fara til Noregs eftir bátinum, og síðani at sigla hann til Føroyar og Runavíkar.

Men hetta gjørdist ein sera buldrasligur túrur, har teir av sonnum fingu eyguni upp fyri, hvussu Gretha royndist í sjónum.

– Hann øtlaði nevniliga veðrið, og vit høvdu faktisk 20 metur um sekundið av vestri beint ímóti.

– Hetta er tað óróligasta sum eg havi verið við bátinum. Annars havi eg ongatíð tonkt uppá veðrið, sigur Sofus Davidsen við einum brosi.

## Ymisk farvatn

Sofus Davidsen er ein teirra sum veit nógv um úróður á tveimum so ymiskum farvatnum sum tí grønlendska og tí føroyska.

– Eg hevði fiskað eitt sindur í Grønlandi, tá eg á heysti í 1978 fekk mær henda bátin, greiðir hann frá. – Og einki var man lærdur.

Og ikki kann sigast annað, enn at bæði maður og bátur hava riggað væl saman. Sofus hevur nevniliga havt henda bátin líka síðani – t.v.s. í samfull 32 ár.




*Sofus Davidsen hevur róð út ein stóran part av lívi sínum, – tey mongu árini umborð á Viksund-báti sínum Gretha*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Næstu ferð ið Sofus fyllir, verður hann 70, og fyri trimum árum síðani avgjørdi hann at leggjast upp á land.

– Eg fór tá í skúrin at vera, meðan ein annar fór at rógva út við bátinum.

## Einki lán

Fyrr varð sagt, at føroyingar vórðu føddir við ár í hond. Men soleiðis er vist ikki longur.

Sofus Davidsen kann í øllum førum staðfesta, at hugurin hjá fólki at røkja sjógvin er ikki tann sami í dag sum áður.

– Tað vísir seg tíverri soleiðis, at eingin hugur er til sjógvin her á leiðini, vísir hann á.

Hann gjørdi tí ikki mætari enn at lýsa Grethu til sølu. Enn er báturin tó ikki seldur, hóast áhugi er fyri honum.

Báturin hevur jú 32 ár á baki og hevur einki lán í sær. Hetta hevur verið Sofusi til fyrimunar, men er helst ikki til sama fyrimun, nú hann ætlar at selja bátin.

> **Hann øtlaði veðrið, og vit høvdu faktisk 20 metur um sekundið av vestri beint ímóti**

– Fleiri hava spurt seg fyri, men eg haldi at bankarnir eru nakað treiskir at veita fólki lán. So enn er báturin ikki seldur.

*snorri@sosialurin.fo*

## FAKTA

### Eitur eftir mammu

Tá Sofus Davidsen yvirtók útróðrarbát sín í 1978, avgjørdi hann at kalla bátin upp eftir mammu síni. Soleiðis fekk báturin navnið Gretha, ið hann hevur enn.

*Annars hevur Gretha hesi eyðkenni:*

**Havnakenningarnr.:** FD 205
**Byggiár:** 1978 hjá Viksund Båt Nor í Noregi
**Mát:** Longd: 12,1 m., breidd: 3,9 m., dýpd: 1,3 m.
**BRT:** 17,49 tons
**Motorur:** Perkins, 137 KW
**Eigari:** Sp/f. Gretha í Æðuvík